UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **5. september 2022**
Tygara ref**.:**
Máltal**.: 21/08502-147**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-018/2022 eftir Tingskipanini §52 a frá Ingilín D. Strøm, løgtingskvinnu, um rættin til eftirnavn, settur landsstýrismanni, Jenis av Rana (eftir § 52a í Tingskipanini)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hví metir landsstýrismaðurin, at børn hjá samkyndum foreldrum ikki kunnu skrásetast við eftirnavninum hjá sammóður?
2. Eru serligar orsakir til, at landsstýrismaðurin ikki vil fylgja tulkingini hjá landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, sum hevur tulkingarmyndugleika?
3. Fer landsstýrismaðurin at geva fólkakirkjuni boð um, at børn hjá samkyndum foreldrum kunnu skrásetast við eftirnavninum hjá sammóður?

Svar

Til 1: Fyrisitingin hjá mær hevur – sum eisini eftir mínum tykki fylgir av vanligum viti og skili – mett, at rættarstøðan er óbroytt, so longi sum navnalógin, ið hevur sera nágreiniligar reglu um hesi viðurskifti, er óbroytt. Hetta hevur navnamyndugleikin undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Umhvørvisstovan, eisini staðfest so seint sum í juni í ár.

Til 2: Fyrst av øllum er at siga, at enn eru ikki tríggjar vikur umlidnar, síðani § 52a fyrispurningurin frá Hervør Pálsdóttir til landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum varð svaraður. Væl áðrenn landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum svaraði umrødda fyrispurningi, hevur fyrisitingin í Uttanríkis- og mentamálaráðnum í einum ítøkiligum máli – við fyrivarni fyri, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið er tulkingarmyndugleikin á økinum, – mett, at børn ikki kunnu fáa eftirnavn hjá sammóðir, uttan so at navnalógin verður broytt.

Navnamyndugleikin á økinum, Umhvørvisstovan, hevur í boðum til borgara so seint sum hin 10. juni í ár boðað frá, at "*Navnalógin er ikki broytt isv. broyting av barsilslógina og lóg um børns retsstilling, og Umhvørvisstovan metir tí, at barn ikki sbrt. verandi navnalóggávu kann fáa eftirnavnið hjá eini sammóður*".

Nú umrødda svar frá landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum til § 52a fyrispurningin frá Hervør Pálsdóttir, tingkvinnu, kom til beint mótsettu niðurstøðu - uttan stórvegis løgfrøðiligar

millumrokningar - hevur umsitingin hjá mær mett, at tað var neyðugt at taka upp samskifti við Umhvørvis- og vinnumálaráðið fyri m.a. at fáa greiði á ymisku tulkingunum hjá sama ráði.

Til 3: Sum landsstýrismaður haldi eg tað ikki vera rætt at leggja meg persónliga út í formliga samskiftið, sum er millum stjórnarráð mítt og myndugleikar á málsøkjum, sum eg varði av, uttan so at heilt serlig viðurskifti skuldu gjørt seg galdandi.

Uttan so at heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi, vænti eg tí, at fyrisitingin í ráðnum sjálv fer at taka møgulig neyðug stig í framhaldi av tí samskifti, sum nú er tikið upp við Umhvørvis- og vinnumálaráðið viðvíkjandi tulkingini í svarinum, sum stendur í beinleiðis andsøgn við tulkingina hjá navnamyndugleikanum á økinum, sum er Umhvørvisstovan.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður